# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lurtið eisini eftir vinnuni!

Landsstýrið hevur eftir øllum at døma einki boð uppá eina loysn av teimum trupulleikum, sum orsakað av oljuprísinum taka seg upp í fiskivinnuni. Tað eru bert tvey signal komin frá landsstýrinum. Annað er, at marknaðarkreftirnar framvegis einsamallar skulu ráða í føroyskum vinnulívi, les fiskivinnuni og hitt er, at byrjandi kreppan í hesi vinnu kann virka til eina neyðuga sanering av flotanum. Vit sleppa av við nøkur skip, og so verður meira til tey skip, ið eru eftir. Til fyrra signalið er at siga, at bert heilt fá lond reka ein búskaparpolitikk, har liberalu marknaðarkreftirnar einsamallar ráða. Flestøll lond reka eitt ella annað slag av konjunkturregulerandi politikki. Heldur ikki her í Føroyum ráða marknaðarkreftirnar einsamallar. Fiskivinnan er undirløgd ymsar reguleringar, ið hava til endamáls at verja fiskastovnarnar og tryggja burðardygga veiði.

Nú stendur landsstýrið so við tveimum valkostum. Annar er at gera sum landsstýrið í fimtiárunum og siga: tað, sum ikki kann standa, má falla. Hitt er at gera politisk tiltøk, sum tryggja, at eitt minstamát av skipum hórar undan. Tað fyrra alternativið er ikki realistiskt hóast útmeldingarnar. Eingin samgonga sleppur væl frá at lata ein stóran part av flotanum fara á heysin við tí úrsliti, at stórir partar av samfelagnum verða raktir av hóparbeiðsloysi. Tí eigur landsstýrið at stíga varliga. Samtíðis sum atlit verða tikin til at varðveita stovnarnar og til lutvísa sanering av flotanum, mugu vit skapa trygg viðurskifti.

Tað er kanska í lagi, at "kyniskir" búskaparfrøðingar mæla til at lata marknaðarkreftirnar einsamallar sanera ein ov stóran flota. Men er tað ikki eitt sindur ábyrgdarleyst av leiðandi politikkarum bara at endurtaka tað, sum búskaparfrøðingarnir siga í slíkari støðu? Landsstýrið hevur eina politiska ábyrgd. Heldur eigur landsstýrið tí nú eisini at lurta eftir ráðum frá vinnuni. Støðan í flotanum er so álvarslig, at tað slepst ikki undan almennari uppílegging, sigur form. í reiðarafelagnum. Hansara tilmæli er at gera eina FAS líknandi skipan fyri fiskiflotan. Hesi ráð falla neyvan í góða jørð hjá øllum, men hetta er so eitt boð og ein roynd at fáa tað almenna at rakna við. Landsstýrið eigur seriøst eftirkanna tey fáu ráð og hugskot, ið koma frá vinnuni og ikke bert automatiskt endurtaka, at her skulu bert liberalar marknaðarkreftir ráða. Hetta síðsta merkir at lata standa til og at lata standa til hevur ongantíð verið ábyrgarfullur politikkur. Vinnan má eisini sjálv vísa vilja. Hvat við mongu milliónunum, sum reiðarar hava útgoldið sær í vinningsbýti øll tey góðu árini. Átti partur av hesum ikki at verið lagdur til síðis til ringari tíðir! Løgmaður skjeyt upp í samrøðu við Rás2 at seta bólk at fylgja gongdini. Ger tað nú. Vinnan og politiska skipanin mugu til at tosa saman.

**Sosialurin**

## Ágangur á tað, ið virkar frá tí, sum er í trupulleikum

JÓGVAN VIÐ KELDU



**Seinastu 30 árini hava yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum roynt at fingið føroyingin at trúgva, at um Klaksvíkar Sjúkrahús varð kvalt, so fekst skil á Landssjúkrahúsið**

Haldi, at eg fari at leggja í vaðið, nú øsingin um Landssjúkrahúsið kortini er.

Seinastu dagarnir hevur samstarvsbólkurin á Landssjúkrahúsinum kravt løgmann á fund, tí hesi kenna seg ótrygg á arbeiðsplássinum, og hava hildið seg verið fyri misáliti, meðan tey hinvegin siga, at tey hava fult álit á leiðsluni.

Temasendingin hjá Kringvarpi Føroya herfyri var áhugaverd, har ymiskar meiningar og metingar sluppu til orðanna. Sum vituligt er, hevur nógv verið frammi fyrr, men tørvandi peningurin hjá sjúkrahúsverkinum er bert øktur.

Kundi seinni hugsað mær í serstakari grein at viðgjørt orðini hjá kenda og væl umhildna yvirlæknanum á Landssjúkrahúsinum, Jón á Steig, tá hann í tónlistamáli crescenderaði, og meðan hann skifti klangfarvu (ella ljómlit) við dramatiseraðum orðum segði, at skal skil fáast á Landssjúkrahúsið, má Klaksvíkar Sjúkrahús niðurleggjast, tí longu eftir kríggið varð sjúkrahúsið í Vágum niðurlagt.

Ja, hvat halda tit um hesar ómotiveraðu útsagnir, sum næstan bert er endurtøka av hansara undangongumonnum. Er nakar sum framvegis trýr hesum?

**Primitiv, ómanslig og elendug framferð**

Seinastu 30 árini hava yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum kappast um at geva Klaksvíkar Sjúkrahúsi skuldina fyri, at Landssjúkrahúsið hevur ligið í trupulleikum.

Hevði Klaksvíkar Sjúkrahús verið niðurlagt, so høvdu vit eitt betri sjúkrahúsverk.

Hetta er primitiv, ómanslig og elendug framferð, tí ovurnýtslan hjá Landssjúkrahúsinum bara seinastu tvey árini er umleið tað sama, sum bæði Suðuroyar og Klaksvíkar sjúkrahús hava í rakstri til alt sítt virksemi samfeld, og framvegis resta Landssjúkrahúsinum 30 mió. krónur omaná.

Nú talan er um at kenna seg tryggan á arbeiðsplássi, áttu starvsfólkini á Landssjúkra-húsinum, brúkt eina løtu og sett seg niður at hugsa um ágangin á Klaksvíkar Sjúkrahús, ikki frá vanliga føroyinginum, men júst frá yvirlæknum og leiðslu á einum arbeiðsplássi, sum hevur verið og er í trupulleikum, við broytingum frá eini- til trístreingjaða leiðslu, frá einfaldum stýrislagi til deplar. Nú er so ætlanin at seta ein stjóra omanfyri alt.

Fer løgmaður á fund og letur seg eyðmýkja, sum kundi verið honum líkt, heldur enn at vísa seg sum sterkan leiðara, verður okkara fremsta sjúkrahús bert koyrt longur út á eggina, og strembanin eftir at niðurleggja eitt vælvirkandi sjúkrahús fer at økjast.

**Fekst at virka**

Sjálvur var eg bæði limur og formaður í Klaksvíkar sjúkrahússtýri frá 1977 til 1984, tá sjúkrahúsið var í síni uppbyggingarfasu. Yvirlæknarnir á Landssjúkrahúsinum vóru eins grovir tá. Teir vildu ikki hava samstarv, hóast vit buðu okkum til at hjálpa.

Nei, eg sigi sum Asbjørn Lómaklett so skilagott segði bløðunum nú um dagarnar, um so var, at Landssjúkrahúsið einferð skuldi farið at virkað, er kortini skeivt at niðurleggja Klaksvíkar Sjúkrahús, sum virkar væl, sum hevur virkað fyrimyndarliga væl seinastu 30 árini hóast dygga ágangin og uppgangin frá bæði Landssjúkrahúsins yvirlæknum og leiðslum, og serliga nú Norðoyatunnilin ger tað léttari hjá fólki at koma frá meginlandinum, og økissjúkrahúsið hjá eysturoyingum er nærkað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.